# ógvuliga spennandi út





*Mangt bendir á, at norðhavssildin – í størri mun enn áður – er farin at taka uppaftur gamla ferðamynstrið. Hetta gevur bjartar vónir hjá teimum, sum fiska og virka sild – og hjá samfelagnum øllum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Bjørn saman við norska starvsbróðuri sínum, Helgu, sum vitjaði í Føroyum fyrr í ár. Á fundi í dag fer fiskimálaráðharrin at tosa við vinnuna um, hvussu leikur skal fara við norðhavssildini í vetur, nú tað vísir seg, at sild framvegis stendur í altjóða sjógvi norðanfyri*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

meira er farið at líkjast tí, vit kenna frá fimtiárunum.

## Kanningar í januar

Fiskifrøðingurin vísir tó á, at Fiskirannsóknarstovan gjørdi kanningar í januar mánaða í ár við Magnusi Heinasyni.

- Vit royndu í gamla vetrarøkinum millum Føroyar og Ísland, men tá funnu vit onga norðhavssild. Nú tað vísir seg, at ein partur av stovninum framvegis stendur í altjóða sjógvi, er ógvuliga umráðandi, at vit fylgja við, hvussu gongdin verður.

Jan sigur, at ein partur av gamla vetrarøkinum hjá norðhavssildini var á markinum millum Føroyar og Ísland, í altjóða sjógvi norðanfyri og við Jan Mayen.

- Tað hevur víst seg seinastu árini, at sildin fer meira og meira út á hav at finna sær vetrarbeiti, og samstundis minkar tann parturin, sum stendur inni á norsku firðunum og út fyri Troms.

## Kann ávirka býtið

Tað er eingin loyna, at broytta ferðamynstrið í framtíðini eisini kann fáa ávirkan á lutfalsliga býtið av norðhavssildini millum londini – og í hesum førinum kann tað merkja, at grundgevingarnar hjá eitt nú norðmonnum fyri sínum parti av býtinum sum frá líður fara at vikna nakað.

Við gamla ferðamynstrinum kann hugsast, at samráðingarstøðan hjá eitt nú Føroyum og Íslandi verður sterkari, men hetta hevur Jan Arge Jacobsen ongan hug at gera viðmerkingar til, tí býtið av sildini verður altíð ein samráðingarspurningur millum strandalondini og ES.

Fiskifrøðingurin heldur nógv benda á, at broytta ferðingamynstrið hevur nakað við umhvørvið at gera.

- At stovnurin er væl fyri, hevur eisini sín týdning. Hitin í sjónum í dag líkist meira hitanum, sum var í fimtiárunum. Seinni gjørdist sjógvurin kaldari, og kanska var tað hetta, sum broytti umstøðurnar og gjørdi, at norðhavssildin minkaði burtur í einki, sigur hann.

## Sildakanningar

Onnur lond gera eisini sínar kanningar, og eisini verða felags kanningar gjørdar av norðhavssildini.

- Felagskanningar vórðu gjørdar í mai, og tá eru øll strandalondini við umframt ES.

Jan sigur, at Fiskirannsóknarstovan sjálvandi hevur stóran áhuga í at gera kanningar av tí týdningarmikla stovni, sum norðhavssildin er – ikki minst, nú tað vísir seg, at viðurskiftini broytast, og sild framvegis er í altjóða sjógvi.

- Okkara áhugi liggur fyrst og fremst í, at stovnurin er væl fyri og verður veiddur skynsamt. Býtið millum londini, og hvussu Fiskimálaráðið skipar viðurskiftini við veiði – og møguligari veiði av kvotuni fyri komandi ár, eru politiskir spurningar, sum vit ikki leggja okkum út í, sigur Jan Arge Jacobsen, fiskifrøðingur, sum at enda leggur aftrat, at nýggj ráðgeving um norðhavssildina kemur fyrsta dagin.

Sum skilst á fiskifrøðinginum, er tó einki sum bendir á, at stovnurin av norðhavssild ikki er væl fyri í løtuni.